sandur.fo



Vælkomin til Sands

SANDS KOMMUNA
trygd og trivnaður fyri øll

# Komin heimaftur



ANNAR EIGARI

*Gamli Grindafossur við bryggju í Skálavík*

mynd: sandportal.fo

Hann var áður heimahoyrandi í Skálavík, men varð seinni seldur vestur í Vágar. Nú er útróðrarbáturin Grindafossur komin aftur til Skálavíkar.

Grindafossur, sum varð bygdur í 1987, ber kenningsmerkið SA 146.

Tað eru feðgarnir, Grímur Kamban og Magnus Jacobsen sum hava keypt gamla Grindafoss aftur til bygdina.

Grindafossur er 10,3 metrar langur, 3 metrar breiður og er 6,5 bruttotons stórur, og varð bygdur suðuri í Vági. Motorurin er av slagnum Cummins.

Sandoyarportalurin skrivar, at tað var Tórstein Christiansen, sáli sum átti bátin av fyrstan tíð. Hann kom í 1978 og varð seldur í 1984.

*snorri@sosialurin.fo*

# Jørðarbeiðið boðið út

**ÍTRÓTTARHØLL** Fyrstu stigini til ætlaðu ítróttarhøllina á Sandi eru nú tikin. Í farnu viku var nevniliga jørðarbeiðið boðið út í almennari lisitasjón

Snorri Brend

**Sandoy:** Arbeiðið fevnir í fyrsta umfari um avgrevstur av mold, graving av eyri, spreinging av hellu, uppfylling av gróti og planering.

Sambært Landsverki verður lisitasjónin á Landsverki í Havn mánadagin 27. september.

Í morgin verður ástaðarfundur við felagsskúlan í Sandoy, har ætlanin er at byggja ítróttarhøllina.

Sagt verður, at arbeiðið skal byrja í næsta mánaði og verða liðugt 15. desember í ár.

Samlaði kostnaðurin er mettur til 27 mió krónur.

## Fígging

Kommunurnar í Sandoynni áttu upprunaliga prosjektuppskotið, sum orsakað av ov stórari fíggjarligari byrðu fyri kommunurnar varð gjørt um til eina landsuppgávu, skrivar tíðarritið STATUS hjá Landsverki.

Uppskotið varð síðani endurskoðað og broytt nakað.

Skipanaruppskot við krøvum og funksjónum er tilevnað og góðkent av bygginevndini. Síðani verður prosjekteringsarbeiðið gjørt liðugt, og nú er so jørðarbeiðið boðið út.

– Restin av arbeiðinum er tengt at, hvussu ein møgulig játtan á fíggjarlógini fyri 2011 fer at síggja út, verður sagt.